# Býráðið

**Dagfesting:** 30.04.2026 kl. 00:00
**Málnr.:** 25/00008

Nevndarlimir: Dávur Juul, Ólavur Larsen, Eyðun á Lakjuni, Eivin Breiðaskarð, Sonni á Horni, Jóan Pauli Olsen, Jastrid á Dalbø, Ørvar Jacobsen, Kristian Martin Petersen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til afgørelse** | | |
| 10/26 | 26/00097-3 | Broytan av byggisamtykt við sandin (niðafyri Gjógvaráveg) |
| 11/26 | 26/00207-1 | Broytan av byggisamtykt niðanfyri vinnuøkið á Kambsdali |
| 12/26 | 26/00210-3 | Uppskot um at avtaka orku- og umhvørvisnevndina |
| | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Til afgørelse**

## 10/26
## 26/00097-3 Broytan av byggisamtykt við sandin (niðafyri Gjógvaráveg)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.03.2026 | 13/26 |
| 2 Tekniska nevnd | 13.04.2026 | 18/26 |
| 3 Tekniska nevnd | 23.04.2026 | 23/26 |
| 4 Býráðið | 30.04.2026 | 10/26 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd og Býráði |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Broytan av Byggisamtykt:<br><br>Kommunan hevur arbeitt við økinum heimi á Oyruni, har tosa hevur verið um at gera eitt trivnaðarøki til okkara borgarar, Eisini fevnir miðbýarætlanin um hetta økið. Tosa hevur eisini verið um, at gera ymiskt átøk í økinum, har Kyrjasteinur stendur.<br><br>Hugsast kann eisini, at fyrr ella seinni verður ein gongugøta gjørd framvið sandinum frá miðbýnum og heim til Gjógvará. Hædd má eisini verða tikin fyri tí.<br><br>Sum er, so liggur partur av økinum sum frílendi og annar partur sum miðstaðarendarmál. Hetta eigur at verða broytt til okkurt, sum gevur møguleikar at brúka økið øðrvísi enn tað sum er galdandi í dag.<br><br>Um økið skal kunna brúkas til hesi endamál má tað broytast frá I: Frílendi til antin F: Almenn frítíðarøki ella A. Miðstaðarøkið<br><br>Til fundin í teknisku nevnd 13. apríl 2026<br>Borgarstjórin metir ikki at málið er búgvið til býráðsviðgerð í verandi líki og heitir á teknisku nevnd um:<br>1. Taka støðu til um talan er um serstaka byggisamtykt(F1) og um ja hvørjar orðingar skulu galda fyri hesa.<br>2. Hvat økið talan er um við tekning á korti og hvørjar matriklar talan er um. |

2

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">Til fundin í teknisku nevnd 23. apríl 2026<br>Kommunstjórin metir ikki at málið er búgvið til býráðsviðgerð í verandi líki og heitir á teknisku nevnd um:<br>1. Oyran ið er lýst at vera K økið á fundi 13 apríl verður óbroytt eftir galdandi byggisamtykt t.v.s økið I<br>2. Grundstykkini frá Oyruni og heim til matr.nr. 724, ið eru lýst á fundi 13 apríl at vera E økið kann ikki fara fram eftir býarskipanini (síðu 22.) hettar má broytast til F økið. Harvið má økið frá Oyrini og heim til matr.nr. 706 gerast til F økið sum tekniski leiðarin eisini hevur tilmælt.<br>3. Frá matr. nr. 706 til og við matr. nr. 695 verður broytt til B økið. Hettar grunda á at sethúsa eru bygd er í økinum og tey liggja eftir galdandi byggisamtykt í økið A og I. Somuleiðis verður mælt til at matr.nr. 624 verður til eitt B økið.</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Formaðurin í Teknisku nevnd ynskir hettar mál tikið upp<br><br>Kommunustjórin vil hava teknisku nevnd taka málið uppaftur, soleiðis at galdandi lógir og samtyktir verða fylgdar.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt.<br>• Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 2. mai 2025<br>Fylgiskjøl.<br>• Vegleiðing til broytingar í byggisamtyktum<br>• kort til fundin 23.04.2026 av byggisamtykt við sandin áðrenn...<br>• kort til fundin 23.04.2026 av broyting av byggisamtykt við s..(uppskot frá umsitingini)<br>• Kort yvir broytta byggisamtykt við sandin eftir fundin 23.04...(samtykt í teknisku nevnd)<br>• Byggisamtykt eftir broyting við Sandin 15.04.2026 sambært te..(ávegis uppskot)<br>• Skitsa yvir uppskoti til F-øki til fundin 30-04-2026</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>X</td><td></td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td></td><td></td></tr>
</table>



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at broyta byggismtyktina til F: Almenn frítíðarøki ella A. Miðstaðarøkið<br><br>**Nýtt tilmæli til fundin 13.04.2026**<br>Tekniski leiðarin mælir til at broyta byggisamtyktina til F: Almenn frítíðarøki sambært korti uttan viðmerkingar.<br><br>**Nýtt tilmæli til fundin 23.04.2026**<br>Tekniski leiðarin mælir til at broyta byggisamtyktina til F: Almenn frítíðarøki sambært korti uttan viðmerkingar.<br>Oyran verður óbroytt t.v.s. I økið.<br>Frá matr.nr. 706 til og við matr.nr. 695, somuleiðis matr. nr. 624 verður broytt til B økið.<br><br>**Nýtt tilmæli til býráðsfundin 30. apríl 2026**<br>Broytingaruppskot er komið frá Dávur Juul. Eyðun á Lakjuni, Kristian Martin Petersen, Eivin Breiðaskarð og Jóan Paula Olsen um bert, at broyta byggisamtyktina frá matr. nr. 729 yvir móti matr. nr. 724 frá I:Frílendi til F:Almenn Frítíðarøki. Broytingin fevnir um matr. nr. 632, 728, 727, 726, 718a, 725 og partar av matr. nr. 713, 729, litra ag og 882a. |
| Dagf | 20.04.2026 |



**<u>Tekniska nevnd 09. mars 2026:</u>**
Tekniska nevnd tekur undir við at broyta til F øki við tí viðmerking at ítróttarbygningar ikki kunnu byggjast í økinum.

**<u>Tekniska nevnd 13. apríl 2026:</u>**
Tekniska nevnd mælir til at gera Oyrina til K økið og at grundstykkini frá Oyruni og heim til matr. nr 724 verður E økið og frá matr.nr 724 til og við matr. nr. 697 verður B økið. Somuleiðis skal matr. nr. 624 broytast til B økið.
K – øki er : 1. Friðaðu økini liggja avløgd til varðveiting av fornminnum. 2. Innan hesi øki kann eingin bygging ella grevstur fara fram uttan, at Føroya Fornminnissavn og byggimynduleikarnir geva loyvi til tess.

**<u>Tekniska nevnd 23. apríl 2026:</u>**
Tekniska nevnd mælir til at gera Oyruna verður eitt I økið smb. Byggisamtyktini, við rætting av linju í korti til fundin í dag. Frá Oyruni og heim til matr. nr 724 verður F økið og frá

matr.nr 724 til og við matr. nr. 697 verður B økið. Somuleiðis skal matr. nr. 624 broytast til B økið. Tekniska deild rættar kortið.
Tekniska nevnd mælir til at byggisamtyktin og býarskipanin verður endurskoða.

**Býráðið 30. april 2026:**
Ólavur Larsen mælir til at taka málið av skrá og arbeiða uppskotið meira ígjøgnum áðrenn tað verður lagt fram aftur.

Jastrid á Dalbø mælir til at gera F økið á uppskotinum í nýggja tilmælinum til eina serstaka byggisamtykt har ítróttarbygningar verður tikið burturúr tekstinum og fær bókstavin F1.

Atkvøtt varð fyrst um uppskotið frá Ólavi Larsen um at taka málið av skrá.

Ólavur Larsen, Jastrid á Dalbø, Ørvar Jacobsen og Sonni á Horni atkvøddur fyri, meðan Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Krisitian Martin Petersen, Jóan Pauli Olsen og Eivin Breiðaskarð atkvøddu ímóti. Uppskotið fall sostatt.

Síðani varð atkvøtt um uppskoyið frá Jastrid á Dalbø.

Ólavur Larsen, Jastrid á Dalbø, Ørvar Jacobsen og Sonni á Horni atkvøddur fyri, meðan Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Krisitian Martin Petersen, Jóan Pauli Olsen og Eivin Breiðaskarð atkvøddu ímóti. Uppskotið fall sostatt. 5

Í triðja lagi varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Eivin Breiðaskarð, Kristian Martin Petersen og Jóan Paula Olsen.

Ólavur Larsen, Jastrid á Dalbø, Ørvar Jacobsen og Sonni á Horni atkvøddur ímóti, meðan Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Krisitian Martin Petersen, Jóan Pauli Olsen og Eivin Breiðaskarð atkvøddu fyri. Uppskotið varð sostatt samtykt.

**11/26**

**26/00207-1 Broytan av byggisamtykt niðanfyri vinnuøkið á Kambsdali**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 13.04.2026 | 9/26 |
| 2 Býráðið | 30.04.2026 | 11/26 |

**Tilráðing**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevnd | | |
| Stutt lýsing av málinum | Neyðugt er at broyta byggisamtyktina á vinnuøkinum á Kambsdali grunda á ætlaða sølu av grundstykkið og nýggja vegaføringin ikki kann útinnast uttan at broyta byggisamtyktina. Kommunan og vinnufyritøka vilja fremja sølu og umbýti í nevnda øki, so ætlani kann fremjast. Hettar er í trá við heildarætlanina í økinum.<br>Kommunan hevur sent skjølini inn viðvíkjandi sølu og umbýti til umhvørvisstovuna til góðkenningar.<br>Umhvørvisstovan hevur avvíst sølu og umbýti ætlanina hjá kommununi. Hettar grunda á, at byggisamtyktin ikki samsvara við ætlanina, tí kann umsóknin ikki gangast á móti<br>Umhvørvisstovan hevur hevur avvíst við brævi tann 10.mars 2026 | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Vegna sølu av grundstykkið og vegaføring | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt<br>• Kort yvir byggisamtykt áðrenn broyting<br>• Kort yvir byggisamtykt eftir broyting<br>• Kort yvir heildarætlanina<br>• Bræv frá Umhvørvisstovuni | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | x | |
| | Umsitingarligar | x | |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at broyta byggisamtyktina | | |
| Dagf | 09.04.2026 | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Vinnu- og havnanevndin 13. apríl 2026:**
Vinnu- og havnanevndin tekur einmælt undir við tilmælinum.

**Býráðið 30. apríl 2026:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá Vinnu- og havnanevndini.

7

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 12/26
## 26/00210-3 Uppskot um at avtaka orku- og umhvørvisnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Orku og umhvørvisnevndin | 13.04.2026 | 6/26 |
| 2 Býráðið | 30.04.2026 | 12/26 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Orku- og umhvørvisnevndini og býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Uppskot er komið frá býráðslimi um at avtaka orku- og umhvørvisnevndina og leggja málsøkini hjá nevndini út í aðrar nevndir. Grundgevingin er at fá mál eru til viðgerðar í nevndini og tað tí er meira skynsamt fyri raksturin, at leggja hesi mál í aðrar nevndir.<br><br>Beinleiðis kostnaðurin av eini nevnd, sum er nevndarsamsýningar og er um 70 tkr. Árliga. Haraftura kemur umsitingarligi kostnaðurin, sum er tíðin umsitingin skal nýta til fundirnar. Talið av málum verður alt annað líka tað sama.<br><br>Talvan niðanfyri vísti talið av málum sum hava verið viðgjørd í ymisku nevdnunum frá 2021-2025. |

| Mál viðgjørd í ymisku nevndunum frá 2021-2025 | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ár** | **2021** | **2022** | **2023** | **2024** | **2025** | **íalt 5ár** | **miðal 5 ár** |
| Vinnu- og Havnanevndin | 55 | 49 | 24 | 36 | 38 | **202** | **40** |
| Orku- og umhvørvisnevndin | 39 | 30 | 9 | 10 | 19 | **107** | **21** |
| Sosiala nevnd | 41 | 33 | 29 | 22 | 40 | **165** | **33** |
| Metnamálanevndin | 35 | 43 | 54 | 47 | 55 | **234** | **47** |
| Tekniska nevnd | 118 | 90 | 58 | 60 | 56 | **382** | **76** |
| Fíggjarnevndin | 55 | 36 | 56 | 67 | 76 | **290** | **58** |
| **Íalt** | **343** | **281** | **230** | **242** | **284** | **1.380** | **55** |

| | |
|---|---|
| | Viðmerkjast skal at talið av málum ikki beinleiðis sigur nakað um arbeiðsbyrðuna, tí mál eru rættuliga ymiskt.<br><br>Staðfestast kann, at talið av málum í orku- og umhvøvisnevndini, 21 í miðal frá 2021-2025, er væl lægri enn miðaltalið fyri allar nevndirnar sum er 55 fyri hetta tíðarskeiðið. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Uppskot er komið at avtaka orku- og umhvørvisnevndina og krevur hetta, at kommunustýrisskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu verður broytt og krevur hetta tvær samtyktir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili. |
| Grundarlag | **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Kommunustýrislógin og kommunustýrisskipanin fyri Fuglafjaðrar kommunu.<br>**Møgulig fylgiskjøl**<br>Teldupostur frá Ørvar Jacobsen | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | j | j |
| | Umsitingarligar | j | j |
| Tilmæli | Mælt verður til at Orku- og umhvørvisnevndin umrøður at avtaka nevndina herundir:<br>1. Um tað er møguligt at seta mál á skrá, sum gera nevndina viðkomandi.<br>2. Um valt verður at taka hana av hvat tað ger fyri «signalivirði» og hvussu hetta skal handfarast.<br>3. Hvar málsøkini eventuelt kunnu flytast. | | |
| Dagf | 10.04.2026 | | |



**<u>Orku og umhvørvisnevndin 13. apríl 2026:</u>**
Orku- og umhvørvisnevndin var ikki samd um at avtaka nevndina. Ørvar Jacobsen ynskir at málið verður lagt fyri býráðið til støðutakan sambært kommunustýrisskipan fyri Fuglafjarðar kommunu.

**<u>Býráðið 30. apríl 2026:</u>**
Atkvøtt varð um uppskotið hjá Ørvar Jacobsen um at avtaka orku- og umhvørvisnevndina og leggja málsøkini í aðrar nevndir at fyrisita.

Ólavur Larsen, Jastrid á Dalbø, Ørvar Jacobsen og Sonni á Horni atkvøddur fyri, meðan Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Krisitian Martin Petersen, Jóan Pauli Olsen og Eivin Breiðaskarð atkvøddu ímóti. Uppskotið fall sostatt.

Fundurin lokin kl.

Dávur Juul

Ólavur Larsen

Eyðun á Lakjuni

Eivin Breiðaskarð

Sonni á Horni

Jóan Pauli Olsen

Jastrid á Dalbø

Ørvar Jacobsen

Kristian Martin Petersen



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo